Fíggjarligar avleiðingar av uppskotinum um at broyta eftirlønarskipanina hjá løgtingsfólki

Hetta notatið metir um fíggjarligu avleiðingarnar av uppskotinum um broyting av eftirlønarskipanini hjá løgtingsfólki, sum er at finna í "Álit við tilmæli um broyting av samsýning og eftirløn til løgtingfólk".

Samandráttur

Verandi eftirlønarskipan er frá 1999. Skipanin líkist nógv einari tænastumannaeftirløn, og løgtingsfólk vinna rætt til fulla eftirløn eftir 16 árum. Fyrstu 8 árini 4,5% um árið og 3% næstu 8 árini. Løgtingsformaður vinnur tó fulla eftirløn eftir 8 ár. Skipanin gevur eisini rætt til hjúnafelags- og barnaeftirløn, um løgtingsfólk doyr.

Álitið hevur eitt uppskot um at broyta skipanina soleiðis, at í staðin verður goldið eitt eftirlønargjald á 15% til góðkenda eftirlønarskipan.

Fyri at meta um fíggjarligu avleiðingarnar av uppskotinum, byrja vit við at rokna fíggjarliga virðið av verandi eftirlønarskipan. Vit nýta vanligan aktuar útrokningarhátt til at meta um samlaða kostnaðin av verandi eftirlønarskipan. Hesin kostnaðurin verður so umroknaður til at rokna eftirlønargjald, har árligi kostnaðurin verður umroknaður til prosent av løn. Tá ber til at samanbera fíggjarliga kostnaðin av verandi skipan við uppskotið til nýggja skipan og at samanbera við aðrar eftirlønarskipanir í Føroyum.

Útrokningarnar byggja á føroysk hagtøl og fyritreytir.

Útrokningarnar vísa, at verandi eftirlønarskipan svarar til eitt roknað eftirlønargjald á 58 – 79% fyrstu 8 árini, løgtingsfólk hevur sætið á tingi, og 38 – 52% næstu 8 árini. Roknaða eftirlønargjaldið er lægri fyri yngri løgtingsfólk og hægri fyri eldri. Eftir 16 ár hava løgtingsfólk vunnið sær fulla eftirløn. Formaðurin í Løgtinginum vinnur fulla eftirløn eftir 8 árum, og roknaða eftirlønargjaldið er tá tað dupulta. Verandi skipan hjá løgtingsfólki líkist nógv tænastumannaeftirlønini, og hon er ein umfatandi og góð eftirlønarskipan. Men tað tekur løgtingsfólki 16 ár at vinna fulla pensjón, meðan tað tekur tænastumonnum 37 ár. Hetta er høvuðsorsøkin til, at verandi skipan hjá løgtingsfólki er ein lutfalsliga dýr skipan.

Uppskotið í álitinum er eitt fast eftirlønargjald á 15%, so her er talan um eina munandi lækking av kostnaðinum til eftirlønir hjá Løgtingsfólki.

Sum vit síggja, er roknaða eftirlønargjaldið í verandi skipan ymiskt frá løgtingsfólki til løgtingsfólk. Men eisini eftir uppskotinum um nýggja skipan eru eftirlønargjøldini ymisk frá løgtingsfólki til løgtingsfólk. Hetta er tí, at uppskotið ásetir eina skiftisskipan, so at eftirlønargjaldið minkar ella fellur heilt burtur, um løgtingsfólk hevur vunnið eftirlønarrættindi eftir verandi skipan. Fyri at kunna samanbera fíggjarligu avleiðingarnar av uppskotinum, hava vit roknað, hvat er meðal eftirlønargjaldið fyri øll løgtingsfólk eftir verandi skipan, og hvat verður meðal gjaldið eftir uppskotinum í álitinum.

Grundað á verandi tingmanning meta vit, at roknaða meðal eftirlønargjaldið er 56% um árið undir verandi skipan. Tað er ringt at meta um, hvussu næsta løgting verður mannað. Men ein varlig meting er, at meðal eftirlønargjaldið verður uml. 10% um árið eftir uppskotinum. Hetta fer tó líðandi at hækka til 15%.

Tað er soleiðis talan um eina munandi lækking av eftirlønargjaldinum, um uppskotið í álitinum verður sett í verk.

Eftirlønarskyldan til løgtingsfólk er seinast roknað til 290 mió kr. Tað fer at taka nógv ár at avvikla hesa skyldu. Men hóast tað, so fer uppskotið um broyting av eftirlønum at minka mundandi um kostnaðin av eftirlønarskipanini til løgtingsfólk. Samstundis fer nýggja skipanin at líkjast meira øðrum eftirlønarskipum í Føroyum.

Heldur verandi skipan fram, fer eftirlønarskyldan at halda áfram at vaksa komandi 15 – 20 árini. Tað er torført at meta um, hvussu nógv skyldan fer at vaksa, tí vit kenna ikki komandi tingmanningar. Men ein yvirskipað meting er, at eftirlønarskyldan kann vaksa upp til 500 mió kr.

Ein broyting í uppskotinum er, at tað er ikki krav um tryggingar, at tryggja eftirsitandi, meðan verandi skipan tryggjar eftirsitandi hjúnafelag og børn væl.

5. mars 2024 // Poul Christoffer Thomassen, Aktuar

Verandi eftirlønarskipan

Vit byrja við eini stuttari lýsing av verandi eftirlønarskipan. Hon byrjaði í 1999 við Løgtingslóg nr. 12 frá 18. februar 1999 um samsýning og eftirløn løgtingsmanna. Hetta er ein eftirlønarskipan, sum líkist tænastumannaeftirlønini. Tó eru tvær týðandi broytingar. Tað tekur 16 ár hjá løgtingsfólki at vinna fulla eftirløn, í mun til 37 ár hjá tænastumonnum. Tó bert 8 ár hjá løgtingsformanni. Harumframt hevur skipanin hjá løgtingsfólki ikki eina óarbeiðsføristrygging.

Eftirlønarskipanin hjá løgtingsfólki er í høvuðsheitum sett soleiðis saman:

Eftirløn: Lívrenta. Veiting, sum byrjar við 67 ár og heldur áfram til løgtingsfólk doyr. Veiting er 60% av lønarflokki 34. (Fyri formann, er tað 60% av tí løn, formaður var løntur í). Fyrsti 8 árini vinnur løgtingsfólk 4,5% av eftirlønini um árið, og næstu 8 árini vinnur løgtingsfólk 3% um árið. Í alt 60%.

Hjúnafelagseftirløn: Doyr løgtingsfólk, fær eftirsitandi hjúnafelagið lívlanga eftirløn á 74% av eftirløn hjá løgtingsfólki.

Barnaeftirløn: Doyr løgtingsfólk, fáa børn undir 21 ár eina fasta pensjón, til tey fylla 21 ár.

Lógin inniheldur nógvar nágreiniligar reglur um eftirlønina og hjúnafelagseftirløn, og vísir eisini til reglurnar í tænastumannaeftirløn. Men tað er ov umfatandi at fara í smálutir í hesum notati.

Um løgtingsfólk vinna sær tænastumannaeftirløn ella hava vunnið sær eftirløn eftir gomlu skipanini fyri landsstýrisfólk, tá verður ein partur hesum mótroknað í løgtingseftirlønini.

Tryggingartekniskar fyritreytir í útrokningunum

Fyri at roknað virðið av eftirlønarrættindum, sum løgtingsfólk árliga vinna sær, verður nýttur aktuar-útrokningar háttur. Tað verður roknað, hvat tað hevði kostað at goldið til líknandi eftirlønarskipan í lívstryggingarfelagi ella eftirlønargrunni.

Hetta er ein vanligur útrokningar háttur, sum verður nýttur at rokna eftirlønarskyldur fyri tænastumenn ella eftirlønarskyldur hjá lívstryggingarfeløgum og eftirlønargrunnum. Í Føroyum vera tær fyritreytir, sum vera nýttar í hesum útrokningunum ásettar av Tryggingareftirlitinum. Hesar eru at finna til seinast í hesum skrivi.

Verandi eftirlønarskipan er líka sum tænastumannaeftirlønin ein sera umfatandi skipan. Tað eru nógvar ymiskar ásetingar, sum taka hædd fyri mongum ymiskum støðum. Ikki allar hesar ásetingar hava líka stóran týdning fyri virðið av eftirlønarskipanini. Tað er ov umfatandi at taka hædd fyri øllum møguleikum í útrokningum. Tí er í staðin gjørt eitt meira einkult útrokningarmodell, sum tekur hædd fyri teimum mest týðandi pørtunum av eftirlønarskipanini hjá løgtingsfólkum, soleiðis at virðið á eftirlønarrættindunum verður roknað so rætt sum gjørligt.

Virðið av eftirlønarrættindunum verður roknað við einum sokallaðum Cash flow modelli. Virðið verður roknað við at gera eina hagfrøðiliga meting av framtíðar eftirlønarútgjøldum. Eftirlønin er ásett sum eitt ávíst prosent stig, í mesta lagi 60%, av lønarflokki 34. Útrokningarnar taka hædd fyri, at løn og harvið eftirlønin hækkar leypandi. Í útrokningunum forvænta vit, at lønin hækkar líka nógv sum inflatiónin. Tey forvæntaðu eftirlønarútgjøldini verða samlað í eitt sokallað cash flow. Virðið av eftirlønarrættindunum verður síðani roknað sum aftur-diskonterað virðið av cash flow. Her nýta vit sokallaðu EIOPA rentuna.

Útrokningar og útlit

Uppskot til nýggja eftirlønarskipan er, at eftirlønargjald verður sett til 15%, sum skal gjaldast inn til góðkenda eftirlønarskipan. Fyri at vit kunnu samanbera verandi skipan við uppskotið, verður virðið av teimum eftirlønarrættindum, sum løgtingsfólk árliga vinna sær, umroknað til eitt árligt roknað eftirlønargjald. Tá ber til beinleiðis at samanbera verandi skipan við uppskotið. Roknað virði á eftirlønarrættindum, sum løgtingsfólk vinnur árliga, verða sett í forhold til lønina hjá løgtingsfólki. Á henda hátt kunnu vit finna eitt roknað eftirlønargjald, sum verandi skipan svarar til.

Talva 1 vísir úrslitið av útrokningunum, har virðið av eftirlønarrættindum verða umroknað til eitt roknað árligt eftirlønargjald

	Verandi skipan			Uppskot
Aldur	**1 – 8 ár**	**9 – 16 ár**	**16 +**	
25	56,6%	37,8%	0%	15%
35	64,9%	43,3%	0%	15%
45	73,0%	48,7%	0%	15%
55	78,8%	52,2%	0%	15%

Talva 1: Roknað eftirlønargjald fyri eftirlønarskipan hjá løgtingsfólki

Løgtingsformaður vinnur eftirlønarættindi eftir hálvari tíð, og hjá løgtingsformanni er roknaða eftirlønargjaldið tí tað tvífalda.

Útrokningarnar vísa, at eftirlønir til løgtingsfólk er ein lutfalsliga dýr eftirlønarskipan. Tað eru serliga 3 viðurskifti, sum gera hetta

- Løgtingsfólk vinna fulla eftirløn eftir bert 16 árum. Hetta er eitt lutfalsliga stutt tíðarskeið. Til dømis tekur tað tænastumonnum 37 ár at vinna fulla eftirløn. Tænastumannapensjón verður vanliga sæð sum ein góð eftirlønarskipan.
- Eftirlønin er ávísur prosentsatsur, í mesta lagi 60%, av lønarflokki 34. Eftirlønin hjá løgtingsfólki verður tí javnað við lønarvøkstrinum í samfelagnum. Eftirlønin er tí vard móti at verða útholað av inflatión. Tað eru fáar eftirlønarskipanir, sum hava hesa verju í dag.
- Eftirlønarskipanin hevur eina fulla hjúnafelagseftirløn, og tá hækkar kostnaðurin av eftirlønini við uml. 20%.

Meðal eftirlønargjald

Talva 1 vísir, at roknaða eftirlønargjaldið í verandi skipan er ymiskt frá løgtingsfólki til løgtingsfólk. Roknaða eftirlønargjaldið er lægri fyri tey yngru enn fyri tey eldru, og hægri tey fyrstu 8 árini enn fyri tey næstu 8 árini. Eftir 16 árum fellur tað heilt burtur. Fyri at meta um fíggjarligu avleiðingina og at samanbera kostnaðin av verandi eftirlønarskipan og uppskotinum, hava vit roknað, hvat meðal eftirlønargjald fyri øll løgtingsfólk er í verandi skipan og í uppskotinum. Tá ber betur til at samanbera kostnaðin av báðum skipanum.

Eftir verandi skipan vinna løgtingsfólk 4,5% í eftirløn tey fyrstu 8 árini á tingi, og 3% tey næstu 8 árini. Eftir 16 ár hava løgtingsfólk vunnið fulla eftirløn, og vinna hareftir ikki meira, og roknaða eftirlønargjaldið er null. Tí er roknaða eftirlønargjaldið ymiskt frá løgtingsfólki til løgtingsfólk. Við støði í verandi tingmanning, hava vit gjørt eina meting av roknaða meðal eftirlønargjaldinum.

Roknaða meðal eftirlønargjaldið eftir verandi skipan er mett til 56% um árið.

Eftir uppskotinum fáa tinglimir eitt 15% eftirlønargjald øll ár, tey eru á tingi, sum skal gjaldast inn á góðkenda eftirlønarskipan. Í uppskotinum eru ásettar skiftisreglur, soleiðis at eftirlønargjald lækkar ella fellur heilt burtur, um løgtingsfólk hevur vunnið sær eftirløn eftir verandi skipan. Tí er

eftirlønargjaldið eftir uppskotinum eisini ymiskt frá løgtingsfólki til løgtingsfólk. Vit kenna ikki, hvussu komandi løgting verður mannað. Tí er torført at meta um meðal eftirlønargjaldið.

Men ein varislig meting er, at meðal eftirlønargjaldið eftir nýggju skipanini verður uml. 10%.

Eftir nýggja uppskotinum fellur meðal eftirlønargjaldið munandi, og tí fellur veruliga útreiðslan til eftirlønir hjá løgtingsfólkum munandi.

Útlit

Hóast tað roknaða meðal eftirlønargjaldið lækkar munandi eftir uppskotinum, fer játtanin til eftirlønir hjá løgtingsfólki væntandi at hækka næstu árini. Hetta er tí, at eftir uppskotinum verður eftirlønargjaldið goldið inn til góðkenda eftirlønarskipan og harvið útreiðsluført beinanvegin. Eftir verandi skipan verður ikki sett av til framtíðar eftirlønarskyldur. Tað er ikki fyrr enn eftirlønirnar verða útgoldnar, at útreiðslan kemur. Men uppá sikt verður allíkavæl talan um eina munandi sparing.

Eftirlønarskyldan til løgtingsfólk er seinast roknað til 290 mió kr. Skyldan fer bert at minka spakuliga, verður uppskotið samtykt. Tað tekur langa tíð at avvikla eina tílíka eftirlønarskipan við lívrentu og hjúnafelagseftirløn. Eftirhondini, sum eftirlønirnar koma til útgjald, og løgtingsfólk fella frá, fer skyldan at minka. Nógvir tinglimir eru ungir, og tað kann taka meira enn 50 ár, áðrenn skyldan er heilt burtur. Í hesum tíðarskeiði kann virðið á skylduni eisini sveiggja, um uppgerðarrentan broytist ella væntaða livitíðin hjá pensjónistum hækkar.

Heldur verandi skipan fram, fer eftirlønarskyldan at halda áfram at vaksa komandi 15 – 20 árini. Skipanin er nú 24 ár, og fyri eftirlønarskipanir sum hesar, heldur eftirlønarskyldan áfram at vaksa, til skipanin er 40 – 45 ára gomul. Tað eru nógv ung løgtingsfólk, og tí tekur tað langa tíð, áðrenn skipanin kemur í javnvág. Tað er torført at meta um, hvussu nógv skyldan fer at vaksa, tí vit kenna ikki komandi tingmanningar. Men ein yvirskipað meting er, at eftirlønarskyldan kann vaksa upp til 500 mió kr.

Útrokningar omanfyri vísa, at verandi eftirlønarskipan svarar til eitt meðal eftirlønargjald á 56%. Hetta er munandi hægri enn eftirlønarskipanir fyri aðrar partar av arbeiðsmarknaðinum. Um uppskotið verður samtykt, tá vil tað minka um munin til aðrar eftirlønarskipanir á arbeiðsmarknaðinum.

Um løgtingsfólk doyr, tá tryggjar verandi skipan tey eftirsitandi væl, bæði børn og hjúnafelag. Uppskotið setur eingi krøv um, at partur av eftirlønargjaldinum skal nýtast til at tryggja eftirsitandi, um løgtingsfólk fellur frá. Um tað ikki vera sett krøv til tryggingar í eftirlønarskipanini hjá løgtingsfólki, kann tað vera stórur munur á, hvussu eftirsitandi vera fyri, um løgtingsfólk doyr. Í versta føri kann hjúnafelagið sita eftir við næstum ongum, meðan eftir verandi skipan hava hjúnafelagið og børn fulla eftirløn.

Fyritreytir nýttar í útrokningum

Tær fyritreytir, sum eru nýttar í útrokningunum, eru hesar:

Renta:	Tann risikofría rentan frá EIOPA fyri DKK pr. 31.12.2023, uttan váðaískoyti.
Lønarregulering:	Vit vænta, at lønin í lønarflokki 34 hækkar við inflatiónini, sum vit seta til 2% um árið.

Livitíð:	Livitíðarbenchmark frá Tryggingareftirlitinum frá desembur 2023, har vit vænta, at føroyskir menn liva í meðal 0,7 ár longri enn danir, og kvinnur 0,9 ár longur. Livitíðarbenchmarkið tekur eisini hædd fyri, at meðal livialdurin hjá pensjónistum fer at hækka komandi árini.
Hjúnafelag:	Vit vænta, at hjúnafelagið er 2 ár yngri enn løgtingsfólk, uttan mun til kyn. Vit vænta, at 90% av løgtingsfólkum eru gift.
Børn:	Vit nýta somu fyritreytir sum tryggingarfeløg fyri talið av børnum hjá løgtingsfólkum (tað sokallaða G82 grundarlagið).
Mótrokning:	Fyri at taka hædd fyri mótrokning í øðrum eftirlønarskipanum, verður virðið lækkað við 20%.

Útrokningar taka ikki hædd fyri møguligum útreiðslum til umsiting av eftirlønini.